TIL SØLU
Hokus-pokus stólur til sølu fyri 300 kr.
Tlf. 42131

KOYRIPOSI YNSKIST
til keyps. Má vera í góðum standi.
Tlf. 16304

HJÁLP!
Er nakar, sum hevur eina koyggjusong at lata fyri litlan pening?
Tlf. 61818

BRIO BARNASTÓLUR
til sølu.
Tlf. 10305

KOYRISTÓLUR
Myrkabláur Simo koyristólur til sølu fyri 1.500 kr.
Tlf. 55936

Bátaútgerð

SLUPP UNGI (Nestangi KG 74)
til sølu um hóskandi boð fæst. Sole diesel 130 HK, Loran, ekkolodd, radara, VHF, 4 snellur, egningartrakt, linur, A fiskiloyvi.
Tlf. 56007

PÁHANGSMOTORUR
Mariner 9,9 HK, í sera góðum standi, til sølu.
Tlf. 56212, eftir kl. 18

YNSKIST
Bátamotorur, diesel 10-20 HK, ynskist bíliga til keyps.
Tlf. 41249

Bingo

FRÍTT VAL BINGO
hvørt mikukvøld kl. 19.30 í Tórs Cafeteria. Nógvir góðir vinningar. 15 vinningar á lutaseðlinum. Tvær ókeypis plátur hvørja ferð.
Tór's Klubbin, tlf. 15438

GOTT BINGO
verður í Pálsstovu sunnudagin 20. apríl kl. 16.00. 15 plátur 100 kr. Full pláta 500 kr. At vinna verður m.a. turr tjógv, matur og gávukort. Høvuðsvinningur ein vikuskiftis flogferð til Danmarkar. Drigið verður millum spølini. Koyring heim aftana.
Gjáar Samkomuhús

BINGO Í PORKERI
Bingo verður í skúlanum mánakvøldið kl. 19.30. Á lutaseðli verður m.a. fullfiggjað parabolskipan. Eykaspælið nú 1.500 kr.
Porkeris Fornminnafelag

RIMMAR BINGO
verður í VB húsinum mikudagin 23. apríl kl. 19. Vinningar á lutaseðli m.a. ferð fyri tvey v/ Norrønu til Bergen, bankabók o.a.
Felagið Javni

GOTT BINGO
verður í skúlahøllini í Trongisvági mánakvøldið 21. apríl kl. 19. Annaðhvørt bingo er 250 kr. Á lutaseðli 2x500 kr.
Suðuroyar Norðara Dansifelag

KØKUTOMBOLA
verður í F.K. í Saltangará leygardagin 19. apríl.
Bústovnurin

BINGO
verður í Ólastovu týskvøldið 22. apríl kl. 19.30 fyri Missiónshúsið. Høvuðsvinningur á lutaseðli keypmansdiskur.
Nevndin

DEYVAFELAGIÐ
hevur gott bingo í Pálsstovu leygardagin kl. 15. 400 kr. til fulla plátu. Drigið verður millum spølini. 15 vinningar á lutaseðlinum, m.a. 5 gávukort á 1.000 kr. Koyring heim. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Deyvafelagið

GOTT BINGO
verður í Havnar Klubba mánakvøldið kl. 19.30. Nógvir góðir vinningar. 15 vinningar á lutaseðlinum, høvuðsvinningur vikuskiftis flogferð.
Billarddeild Havnar Klubba

GOTT BINGO
verður í Ólastovu flaggdagin kl. 16. 75 kr. til eitt rað, 150 kr. til tvey rað. 400 kr. til fulla plátu, to 800 kr. til 6. spæl. Høvuðsvinningur á lutaseðlinum er ein ferð fyri 4 persónar v/ bili til Noregs v/ Norrønu.
Parkinsonfelagið

STÓRT BINGO
verður í Bygdarhúsinum í Kollafirði leygardagin 19. apríl kl. 16. Nógvir góðir vinningar. 12 plátur 100 kr. Lutaseðlar verða seldir, har vinnast kann m.a. ein vikuskiftis flogferð.
Giktafelagið

STUÐLAFELAGIÐ Í.S.B.
hevur gott bingo í Havnar Klubba týsdagin 22. apríl kl. 19.30. 12 plátur 100 kr. At vinna gávukort á 300 og 800 kr. Burturlutað verða m.a. tvey gávukort á 500 kr. og vikuskiftis flogferð.
Nevndin

STUÐLAR HJÁ JAVNA
hava gott bingo í Pálsstovu mánakvøldið kl. 19.30. Nógvir góðir vinningar so sum bl. dogurðamatur, krt. av kotelettum og gávukort. Drigið verður millum spølini. 15 vinningar á lutaseðlinum, m.a. gávukort á 1.000 kr. og 500 litrar av olju. 15 plátur fyri 100 kr. Koyring heim. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Stuðlar hjá Javna

GOTT BINGO
verður í Bygdarhúsinum í Hósvík sunnudagin 20. apríl kl. 16. Nógvir góðir vinningar. Eykaspælið nú gávukort á 3.200 kr. 6. og 12. spæl gávukort á 500 kr. 12 plátur fyri 100 kr. Øll eru vælkomin.
Bygdarfelagið Varðin

GOTT BINGO
verður í Havnar Klubba mánakvøldið 21. apríl kl. 19.30.
Billarddeild Havnar Klubba

GOTT BINGO
fyri pensionistafelagið Kveldarsól verður í Samljóð í Skopun 28. apríl kl. 19. Lutaseðlar verða seldir. Nógvir góðir vinningar.
Nevndin

GOTT BINGO
verður í Ólastovu sunnudagin 20. apríl kl. 16. Gávukort til hvørja fulla plátu. 10 vinningar á lutaseðli, m.a. gisting á Giljanesi fyri tvey vaksin og tvey børn, havamøblar, turt tjógv og annað gott.
Haldórsvíkar Avhaldsfelag

NORÐOYINGAR!
Mat- og køkutombola verður í Nólsoyar Páls Gøtu 7 (yvirav FK) leygardagin 19. apríl kl. 9.40. 8.b. skúlin á Ziskatrøð

KØKUTOMBOLA BILVASK - KAFFISØLA & LUTASEÐLAR
verður í hølunum hjá Esmar Simonsen við Bygdarhúsið. Køkutombola byrjar kl. 10. Bílvask byrjar kl. 13. Lutaseðlar verða seldir fyri 5 kr. stk. Drigið verður kl. 18.
10. a í Fuglafirði

GOTT BINGO
verður í Glæmuni í Kvívík 20. apríl kl. 16. Nógvir góðir vinningar, m.a. ferð fyri tvey til Noregs.
1. R í Hoydølum

BINGO 19. APRÍL ER AVLÝST
Bingo, sum skuldi verða í Ítróttarhøllini á Hálsi leygardagin 19. apríl, er avlýst.
Foreldrabólkurin hjá Neistanum

FUGLAFJARÐAR PENSIONISTAFELAG
hevur bingo í Lonini leygardagin kl. 16. Gávukort til fulla plátu. Á lutaseðli trý gávukot á 500 kr. og nógv annað.
Nevndin

BINGO
verður í VB-húsinum dýra biðidag 25. apríl kl. 16.30.
V.B.

GOTT BINGO
verður í Eydnuni 25. apríl kl. 19, har nógv gott verður at vinna. Full pláta 400 kr. Drigið verður millum spølini. Eykaspælið nú 2.000 kr.
Eydnan

BINGO
til frama fyri Eldrasambýlið í Vági verður í VB-húsinum tórskvøldið 1. mai kl. 19.30.
Vágs Matmøðrafelag

EYSTANKÓRIÐ
hevur gott bingo í Ólastovu leygardagin 19. apríl kl. 16. Høvuðsvinningur á lutaseðli: Gávukort á 1.000 kr.
Eystankórið

Burturm./funnið

HARRA UR
funnið nærhendis S.M.S.
Tlf. 12174

BRILLUR FUNNAR
uttan fyri Igloo fyri viku síðani. Brillurnar eru sterkar. Eigarin fær brillurnar í Igloo.
Tlf. 15264

BURTURMIST
Hevur nakar funnið einar brillur eftir uml. 14. mars 97, so ring
Tlf. 16013

Býli

FJALSGARÐUR
Hevur tú hug at venda gráa gerandisdegnum bakið? Kundi tú hugsað tær nakrar dagar í óspiltum umhvørvi við góðum møguleikum at fara eitt nú á seiðaberg og gongutúr í hagan, og annars njóta »livið á bygd«? So er Fjalsgarður í Oyndarfirði staðið, tú hugsar um!
Tlf. 44522 - fax. 44570

HUGNALIG FRÍTÍÐARHÚS TIL LEIGU VIÐ GJÓGV
Tað eru eini eldri hús við øllum hentleikum so sum sjónvarpi og vaskimaskinu.
Tlf. 21305

FERÐIST Í NÓLSOY – gistið í Liða
Hetta er tann tíðin, tá ið bindiklubbar plaga at biðja sær pláss í Liðahúsunum til ein felags túr úti á bygd. Upplivið náttúruna og gestablidnið samstundis sum tygum búgva í einum sera hugnaligum, 200 ára gomlum húsum við øllum hentleikum. Búgvið væl, búgvið bíliga!
Ringið tlf. 48001

NÝGGJ FRÍTÍÐARHÚS
í Skálavík til leigu. Húsini standa væl fyri við útsýni yvir bygdin og víkina. Allir vanligir hentleikar eru í húsinum, sum eisini hava centralhita.
Tlf. 11197

HÚS Í HVALVÍK
Eldri hús í Hvalvík til sølu.
Tlf. 22053

LEYP IKKI Á BLÁMAN – far á Bládýpi
Bládýpi
Dr. Jakobsensgøta 14-16
Tlf. 11951 - Fax 19451

»FOSSSTOVA« Frítíðarhús í Mikladali
Bíligt innivist fæst í góðum og rúmligum húsum. Húsini eru væl egnað bæði til einstaklingar og bólkar.
Tlf. 13660 ella 15339

ÍBÚÐ ELLA KAMAR
ynskist til leigu nærhendis miðbýnum.
Tlf. 44088

RAÐHÚS Í SVANGA TIL LEIGU
í tíðarskeiðnum 1. juni 1997 til 15. aug. 1998. Húsini eru 100 kvm, hava 3 soviverilsir, køk, stovu, lítið fýrrúm og eitt wc. Tlf. 10895

HÚS Á HELLUNUM
til sølu.
Tlf. 44397

ÍBÚÐ ELLA KAMAR
Ungur húsligur maður søkir íbúð ella kamar í ella nærhendis Havnini. Fer væl um.
Tlf. 10585, eftir kl. 18

ÍBÚÐ YNSKIST
Søkt verður eftir íbúð til leigu í Tórshavn til tvey ung fólk. Helst frá 1. mai.
Tlf. 44383

HÚS TIL SØLU
um hóskandi boð fæst. Standa miðskeiðis á Tvøroyri. Sera gott útsýni.
Tlf. 71238 ella 17921

YNSKIST
Familja við trimum børnum ynskir hús ella stóra íbúð til leigu. Roykja og drekka ikki.
Tlf. 21411

ÍBÚÐ YNSKIST
til leigu í Havn skjótast gjørligt.
Tlf. 19582

SETHÚSINI Á REYNSGØTU 29
eru til leigu frá 1. juli. Prísur 5.000 kr. u/ ljós og hita. 5.000 kr. í depositum krevst.
Tlf. 13589

VESTMANNA
Tey, sum vilja leiga út til næmingar á Fiskivinnuskúlanum skúlaárið 97/98, verða biðin um at ringja á
Tlf. 24573

KAMAR
mitt í býnum við atgongd til køk og bað, til leigu. Egna inngongd.
Tlf. 17301

HÚS TIL SØLU
Um hóskandi boð fæst selja vit hús okkara í Skálavík. Húsini eru frá 89.
Tlf. 61719

SUMMARHÚS
Uml. 15 km eystan fyri Álborg, við 8 seingjarplássum (3 verilsir), køkur/stova í einum, wc og brúsurúmi til leigu, undantikið vikurnar 27, 28, 29 og 30.
Tlf. 15813

HÚS Á TVØROYRI
Húsini standa í Valinum og eru til leigu (møguliga sølu).
Tlf. 10848 ella 19111

HÚS Í SANDAVÁGI
til sølu.
Tlf. 32227

HÚS YNSKJAST
til leigu í Havn skjótast møguligt.
Tlf. 13301, eftir kl. 17

HÚS TIL SØLU
Um hóskandi boð fæst, selji eg hús mini við Gjógv. Húsini eru bygd í 1991 úr betongelementum og takt við Dekra. 120 kvm. til støddar, og miðhæddin fult innrættað. Húsini verða sýnd fram eftir avtalu.
tlf. 22295, kl. 9–16
tlf. 23329, eftir kl. 16

BYTTE FERIE BOLIG?
Ønsker: Tórshavn - midt by. Haves: København - centrum. Perioden 26/6–12/7-97.
Tlf. 031548252

FERÐIST Í SANDOY!
Í Skopun eru stór og góð hús við øllum hentleikum til leigu. Har eru nógv soviplass. Nærri frættist á
Tlf. 61747 - 61417 - 61334

ÍBÚÐ YNSKIST
Einlig mamma við tveimum børnum ynskir íbúð til leigu frá 1. juni fyri sámuligan pris. Helst í vesturbýnum.
Tlf. 19428

ÍBÚÐ/HÚS YNSKIST
Sjúkrasystralesandi og hfnæmingur við 3 ára gomlum barni ynskja stóra íbúð /lítil hús til leigu í Havn sum skjótast.
Tlf. 18909

Dýr

FRENSUR HORVIN
Eg søknist eftir einum frensi, hann er gráur við hvítum blettum á ryggínum, er spakur og sera fittur. Sært tú hann, so ring
Tlf. 44138

KETTLINGAR
Vit eru tríggir sera fittir kettlingar, sum eita Tubbi, Sumba og Stubbi. Vit kundu hugsa okkum at komið og búð hjá djóravini um 7 vikur. Vónandi lesur onkur hetta og bjargar okkum.
Kristiansgøta 1,
188 Hoyvík

ENSKIR UNDULÁTAR OG TILHOYR TIL SØLU
Enskir undulátar, 300 kr. Góð fuglareiður, 50 kr. Fuglabúr, 60x65x40 cm, 400 kr.
Tlf. 10292

GÁSARBØGA
Er nakar, ið hevur eina gásarbøgu til sølu, ella í býti við steggja, so ringið
Tlf. 14226

YNSKIST
Lítil hundahvølpur ynskist.
Tlf. 13134

TARVSKÁLVUR
bíliga til sølu.
Tlf. 18022

ANSA EFTIR ROSSUM
Er nakar, ið ynskir at fáa ross sitt passað í eina tíð, so ring
Tlf. 41363

FITTUR HUNDAHVØLPUR
undan lítlari tík verður latin djóravini.
Tlf. 21597

Fundir

AÐALFUNDURIN HJÁ F.P.S.
verður í L. Debesargøtu 14 mánakvøldið 3. mai kl. 19. Eftir fundin heldur August G. Wang, yvirlækni, dr. med., fyrilestur. Evni: Hvørjar psykiskar sjúkur fara at verða í næstu framtíð? Uppskot til aðalfundin skulu vera felagnum í hendi í seinasta lagi 28. apríl.
Føroyskar psykiatriskar sjúkrasystrar

AMNESTY INTERNATIONAL
Aðalfundur verður hóskvøldið 17. apríl kl. 19 á Landsbókasavninum.